# Nýggjársrøða 31. december 1978.

Góðu landsmenn!

Seinnu árini hava verið stórliga merkt av broytingum í vinnumøguleikum og merkt av teirri óvissu, vit hava verið noydd at liva undir viðvíkjandi hesum broytingum.

Serliga eru tað broytingarnar í fiskimøguleikum, nú sáttmálar um fiskilovvir, aftan á útflyting fiskimarkanna, skulu endurnýggjast á hvørjum ári, sum skapa óvissu og tørvandi trygd innan okkara høvuðsvinnu og harvið innan alt búskaparligt lív í Føroyum.

Á gáttini til árið 1979 er tann óvissa, sum eg umrøddi á ólavsøku viðvíkjandi fiskivinnuni og lívsæðrini í føroyska samfelagnum ikki minni, tí í ongum føri er endaliga greitt, hvørjir sáttmálar verða at galda á teim leiðum, ein stóruur partur av flota okkara skal royna.

Samráðingar standa fyri aftur í januar við flestu av teim londum, vit skulu samvinna við. Bert sáttmálan við Sovjet er liðugt at samráðast um men hevur heldur ikki hann fingið løgtingsins góðkenning, so í veruleikanum eru bert fyribils fiskiloyvir fyri januar mánaða 1979 galdandi á øllum leiðum.

Tá hartil kemur, at sitandi landsstýri, sum skal greiða tær neyðugu samráðingarnar, bert er fyribilsstýri, so skilst, at óvissan um møguleikar føroyinga til at taka avgerðir fyri at menna og varðveita framburðin, er enn møtismiklari at liva við enn fyri ári síðani.

Árið 1978 royndist annars føroyingum hampuligt á ymsan hátt, og menning og framburður vóru eisini eyðsýnilgi í øllum liðum samfelagsins, men slíkt metár til framleiðslu, útflutning, fiskimannainntøkur og rentabilitet hjá fiskiflotanum sum árið 1977 royndist, verður ikki árið, sum nú brátt er komið at enda.

Útflutningur okkara togar sambært fyribilsuppgerð upp ímóti 780 mill. kr., sum er góðar 80 mill. kr. minni enn í 1977, men 150 mill. kr. meira enn í 1976.

Orsøkin til fallið í útflutningsvirðinum er ikki, at minni er veitt sum heild, men heldur, at dollarvirðið broyttist so ómetaliga nógv og harafturat, at meira er veitt av bíligari fiskasløgum enn árið fyri.

Samlaða veiðan er 316.000 tons ella um 6000 tons fleiri enn í 1977, og eru vit sostatt triðja árið á rað komin upp um 300.000 tons í heildarveiðu, eitt tal vit fyri fáum árum síðani valla hugsaðu um at røkka.

Undir Føroyum hava vit veitt 99.000 tons (73.000 tons av matfiski og 26.000 tons av svartkjafti). Hetta er ein øking við 14.000 tonsum í

mun til 1977, og tað eru upsi, kongafiskur og svartkjaftur, sum eiga henda vøkstur.

Veiðan undir Føroyum er nú góð 31% av samlaðu veiðuni, meðan hon í fjør var 27,5% og í 1976 19%.

Gongdin seinastu árini, har meira verður veitt á egnari landleið heldur sostatt fram, og er bert eftir 2 árum hend ein øking við meira enn 20.000 tonsum av matfiski, sum eru avreidd til føroysk flakavirki.

Nevndi ífjør, at tiltøk, sum framdu upsaveiðuna og avmarkaðu toska- og hýsuveiðuna, skuldu fremjast. Roynt hevur verið at stuðla til økta upsaveiðu við munandi studningi til fiskaprísin, og nú 16.000 tons eru veidd av upsa kann sigast, at nakað er rokkið ávegis her, men tað ber til at ganga mundandi longur á hesi leið, tí teir ónýttu møguleikarnir í upsa-, longu-, blálongu-, brosmu-, kongfiska- og langasporlsstovnunum eru enn stórir.

Í fiskirættindabýtinum, sum nú støðugt skal fremjast, hava hesir stovnar stóran týdning og afturat teimum serliga svartkjaftastovnurin.

Búskaparliga økið okkara sum heild gav í 1978 frá sær 303.000 tons av fiski, harav 196.000 tons var svartkjaftur.

Tað gleðiliga hendi í ár, at tað fyri fyrstu ferð í fleiri ár eydnaðist at halda veiðuni eftir toski og hýsu innan fyri teir karmar, sum fiskifrøðingar hava mælt til í tí sokallaða TAC'num ella hægst loyvdu veiðuni. Samlaða veiðan av toski og hýsu var hjá øllum tjóðum 50.000 tons, sum er niðanfyri loyvda markið í 1978.

Tíverri er kanska ein orsøkin til hetta, ringa veðrið í heyst, sum hevur tarnað vanliga línuróðrinum nakað.

Økið, har føroyingar í ár hava veitt meira enn í fjør, er umframt Føroyaleiðirnar, Íslandsleiðirnar, Norkst-Sovjettiskt øki og við Canada og á Flemish Cap, og er tað serliga lodnuveiðan, sum er økt.

Í Grønlandi, við Rokkin og í EEC-øki annars er harafturímóti munandi minni veitt, og hendan gongd verður, sum útlitið er í løtuni, helst at halda fram.

Men sum ofta fyrr er víst á, so skuldi við neyvari stýring av íløgunum til teir givnu kvotamøguleikarnar og við íløgum í øktar viðgerðarmøguleikar hjá virkjunum á landi, verið møguligt framhaldandi at tryggja tað til samfelagsraksturin neyðuga framleiðsluvirði.

Hóast minni útflutning í 1978 tykist innflutningurin ikki at minka, men heldur at vaksa. Føroyar koma tí í 1978 at hava eitt rættuliga stórt gjaldsjavnahall. Við øllum fyrivarni kann metast, at hetta verður millum 70 og 110 mill. kr.

Aðrastaðni hava seinastu árini kennst verulig kreppuár við vaksandi arbeiðsloysi og versnandi rentabilitetsviðurskiftum í framleiðsluvinnu, men í Føroyum hava viðurskiftini verið merkt av ógvuliga stórum økonomiskum virksemi (aktiviteti).

Íløgurnar í skip, ídnaðaríløgur og íløgur í vinnulívsbygging á landi (handilsbyggningar) hava verið ovurstórar, serliga árini 1976-78.

Í ár eru komin til landið 20 nýgg skip fyri 90 mill. kr. og í fjør 30 skip fyri 150 mill. kr. Handilsbygningar- og ídnaðarbygningar umboðaðu í 1977 150 mill. kr., og upphæddirnar í ár eru ivaleyst eisini risastórar.

Tann innflutningur, sum hevur staðist av hesum, tyngir føroyska gjaldsjavnan munandi, tí íløgurnar eru fyri ein part fíggjaðar við útlendskari lántøku. Tá harafturat býtislutfallið í uttanlanda handli okkara framvegis er so nógv verri enn t.d. í 1973, má hetta merkja, at Føroyar hava økt uttanlandaskuldina seinnu árini. Roknað er við, at henda øking síðan 1970 liggur um 160-180 mill. kr., og at samlaða skuldin í dag er um 4-500 mill. kr.

Tað var við oljukreppuni í 1974, tá innflutningsprísirnir hækkaðu og útflutningsprísirnir lækkaðu, at býtislutfallið versnaði so nógv og harvið møguleikarnir fyri at uppihalda einum gjaldsvjavnayvirskoti minkaðu so munandi.

Í 1977, sum vinnuliga sæð var eitt metár, batnaði býtislutfallið nakað, men mót endanum av 1977 og beinanvegin í 1978 avlagaðust hesi viðurskifti aftur, tí dollarvirðið fór í´botn og skapti eitt nervandi prísfall á øllum útflutningsvørum; hetta saman við versnandi veiðumøguleikum á fjarleiðum hvat dýrari fiskasløgum viðvíkur ger, at rentabiliteturin hjá vinnuni í 1978 kemur at sýna afturgongd.

Trýstið á ráfiskagrunnin, sum hevur roynt at laga upp í tíðini fyri at bøta um tapið hja´vinnuni og fyri at halda útróðrar- og fiskimannainntøkunum uppi, sýnir hetta betri enn annað.

Við teirri útjavning, sum fer fram yvir skatta- og studningsskipaninar og við teirri búskaparligu stabilisering, sum ríkisveitingarnar uppá útvið 3oo mill.kr. merkja í lágkonjunkturi, vil hin einstaki í 1978 helst ikki halda, at hann inntøkuliga sæð er verri fyri enn í 1977.

T.d. verða fiskimannainntøkurnar pr. dag hægri í 1978 enn í 1977 innan allar veiðuhættir, tá rækjuskip, saltfiskatogarar og kraftblokkaskip eru undantikin. Hesi skip vóru frammanundan tey, har inntøkurnar lógu í tí frægara endanum.

Tímalønt á landi og fastlønt hava sambært sáttmálar tryggjað sær ávísan lønarvøkstur í 1978, so eisini hesum roynist árið hampuligt, serliga tí meiri arbeiði hevur verið fyri hendurnar, orsaka av størri íløgum og viðgerð av øktari rávørunøgd.

Hvat uppiløgurnar í heyst hava haft at týða fyri ársinntøkur útróðrarmanna hava vit tíverri enn eingi tøl fyri, men hugsandi er, at her er úrslitið lakari hjá onkrum.

Ein kann so spyrja um skeivt hevur verið atborið, tá uttanlandaskuldin, til tess at tryggja økt virksemi í samfelagnum og til at útbyggja til framtíðarmøguleikar, er økt í sjeytiárunum.

Sjálvur haldi eg svarið er nei, men vert er at leggja afturat, at nú rentubyrðan av hesi skuld togar upp ímóti 4o-5o mill.kr. árliga, er orsøk til at sýna varsemi og at prioritera íløgurnar soleiðis, at tær mest koma framleiðslufremjandi tiltøkum til góðar, og her eru, sum eg skal koma aftur til, mong øki enn at útbyggja, skulu rímuligir møguleikar tryggjast øllum, sum hava hug at balast á hesum oyggjum.

Havi mangan nevnt, at tær studningsskipanir, vit hava, eru so generellar, at ofta fer peningur til beinleiðis víðkan av einum forbrúki, sum frammanundan má tykjast rímuliga høgt, í hvussu er tá samlaða orka samfelagsins verður havt í huga, meðan ov lítið verður latið á øðrum økjum.

Nevnda prioritering (sum teir nú nevna valið millum meira og minni neyðug tiltøk) má fyrst í komandi ári fremjast eisini í studningsskipanunum.

----------

Føroyskur búskapur, grundaður á at nærum øll framleiðsla skal útflytast og nærum øll nýtsla innflytast, meðan arbeiðstreytirnar eru tengdar at sáttmálaviðurskiftunum við granna- og viðskiftalond, hevur størri orsøk enn hesin hjá londum við meira fjøltáttaðum vinnugrundarlagi at fylgja við alheims fíggjarrákinum.

Serliga hevur tað verið inflatiónir í vesturheiminum við vantandi búskaparvøkstri og versnandi gjaldoyristrygd, sum hevur nervað okkara viðurskifti.

Dollarvirðið, sum m.a. er treytað av í hvønn mun tað eydnast U.S.A. at fáa javnvág í uttanlandahandil og framleiðsluøking og tamarhald á inflatiónini, hevur so ovurhonds stóran týdning fyri okkara møguleikar, at kenslan av, at hesin dollari helst eisini í 1979 verour ótrygt gjaldoyra, minna okkum á, at øll neyðug dubbingartiltøk mugu setast í verk at tryggja framleiðsluni rímuligari sømdir, og øll hugsandi útbygging, sum kann breiðka støðið undir búskapi okkara, má fremjast. Hetta verður ikki gjørt, uttan at tað í onkrum føri gerst trengri hjá einstøku tegnum landsins. Samlaða orkan er einaferð ikki størri enn framleiðsluvirðið og trúverdugheit okkara sum lántakarar uttanlanda fyriseta.

Í seinasta hálvársfrágreiðing síni metir OECD, sum er vesturlandanna felagsskapur fyri búskaparligari samvinnu, at útlitið fyri 1979 er bjartari enn verið hevur, bæði tí teir vænta minkandi inflatión,og tí gjaldoyrissamvinnan fer at geva tryggari gjaldoyrisviðurskifti, men longu nú eru tekin um, at sumt av tí, hesir spádómir byggja á, heldur ikki. T.d. kemur príshækkingin, oljuútflytandi londini hava boðað frá, saman við rembingum í hesum londum og í triðja heiminum, helst at merkja, at tann dollari, sum enn er viðurkent gjaldoyra í internationalum handli, ikki styrknar tað, vit kundu vóna, men heldur framvegis verður veikur. Hetta saman við óvissuni um avmarkingarnar í okkara fjarfiskiskapi kann lættliga ávirka fíggjarviðurskifti Føroyar til tað verra í 1979.

-------

Vit verða tí í 1979 og árini framyvir at útbyggja til broyttar møguleikar, m.a. við íløgum í økta viðgerð av fiski undan Føroyum. Landsstýrið hevði í summar ta meting, at framleiðsluorkan á fiskavirkjunum, sum í løtuni er 70.000 tons við 1 skifti rakstri, sum skjótast má verða økt til 110-120.000 tons. Ein kanning, sum Egnsudviklingsdirektoratið danska júst hevur gjørt, tekur undir við hesi meting. Hetta krevur í stutta tíð íløgur uppá 150-175.mill.kr.

Hesar íløgu verða fyri bíligari fiskasløg sum upsa, kongafisk og blálongu, so efturi stendur eisini arbeiði fyri at tryggja betri søluprís, effektivari framleiðslu og margfaldan av vørusløgunum, seljast skulu.

Í ídnaðinum á landi og landbúnaðinum verða eisini stórtøk at taka, sum miða ímóti at tryggja arbeiði til allar hendur á teim plássum, har búseting er í løtuni. Hitt almenna fær her uppgávur hvat stýring og fígging viðvíkur, sum svara til tann settning, landið fyri árum síðani setti sær fyri fiskivinnuna og fiskaídnaðarvirkini.

Fyrsta dagin verður latið landsstýrinum nevndarálit, sum ein ídnaðarnevnd greiðir úr hondum, og vil hon geva okkum grundarlag at meta um hendan settning.

Afturat kemur, at íløgurnar í orku til okkara framleiðslurakstur og í nýggjar orkumøguleikar, saman við teim umhvørvisverjandi tiltøkunum, verða ovurstórar komandi árini.

Hetta sigur okkum, at ráðini til eina forbrúksvíðkandi lønar- og úrtøkuskipan ikki liggja beint aftan fyri sýn, tí skal samfelagsorkan fyrst og fremst nýtast til at tryggja framtíðina, meðan haft verður í

huga, at einki samfelag í longdini kann liva uttan javnvág ímillum framleiðslu og nýtslu, so kunna vit eins væl beinanvegin gera okkum greitt, at varsemi í nýtslu, skynsemi í útbygging og dubbing kunnleikaliga verða høvuðstættirnir í skapan av lívsmøguleikum her á landi.

Tey kendu orðini hjá bretska politikkaranum um útlit til eitt tíðarskeið merkt av blóði, sveitta og tárum søgdu júst í tíðini, tey blivu søgd frá galdandi verunleika, men eru tey síðani so mangan misnýtt at mála daprar myndir av mongum lívsviðurskiftum við. Tað er eingin orsøk hjá okkum at nýta slíkt orðalag, tí vit hava eitt gott samfelag, eitt sterkt samfelag, eitt ríkt samfelag við mongum møguleikum, verður tað rætt umsitið. Men vit skulu gera okkum greitt, at tað arbeiðssemi, tann virðing fyri materiellum virðum og tað skynsemi í umsiting, sum forfedrar okkara skuldu eiga fyri at skapa lívsmøguleikar á hesum oyggjum, má ognast hvørjum einstøkum av okkum, og vit skulu gera okkum greitt, at tann stuðul, vit hvør sær koma at lata til framhaldandi útbygging, aldri má gerast ein koddi, sum loyvir leiðsluni í samfelag og framleiðslu okkara hvíld, men bert elvir til at vinna sum mest burturúr givnum møguleikum, tí ikki ber til bert at draga nýggjar møguleikar uppí, teir tømast einaferð.

Hugsanina um beinleiðis medábyrgd og avgerð alra íbúgva í hesum samfelag eiga tí ídag størri aktualitet enn nakrantíð fyrr.

--------

Politiskt er støðan merkt av ótryggleika og ívissu. Valið í hesyt hevur ikki útloyst møguleikar fyri skjótt at fáa í lag ein politiskan meiriluta, sum vil átaka sær ábyrgd av teim metingum og avgerðum, neyðugar verða.

Men vónandi eydnast samvinnandi fólkastýrinum innan alt ov leingi at fáa til vega eina nóg sterka politiska leiðslu í hesum landi.

Hendan fær úr at gera, fyrst og fremst við at konsolidera verandi samfelagið, seta í verk tey stórtiltøk, samtykt vórðu í heyst og framhaldandi skapa trygd sosialt og vinnuliga við góðum umstøðum at liva eitt ríkt andaligt og mentunnarligt lív her á landi.

Hetta gamlaárskvøld skal eitt av ynskjum mínum fyri Føroya fólk verða, at tað ikki eydnast kreftum, sum helst sáa misnøgd, og í góðskunnar seyðaklæðum, sum ofta eru sjálvgóðskunnar búni gera seg til dómarar yvir medmenniskjum, sum eisini gera sína skyldu í okkara samfelag, at ørkimla so, at kenslan hjá hinum einstaka av, at hann og hon liva sum fræls menniskju í frælsum landi, verður skerd.

Vit lata ikki tað spæl upp til intoleransu, vit á ávísan mun hava merkt seinnu tíðina, sleppa at dálka okkara siðmenningarliga, mentunnarliga og andaliga umhvørvi..

Tankar okkara leita til teirra, sum í árinum vóru fyri svárum missi, og kenna vit djúpan samhug við hesum.

Landsstýrisins vegna og egna ynski eg øllum føroyingum burturi og heima eitt eydnuríkt nýár og Harrans signing í tí verki, vit hvør sær greiða úr hondum komandi ár.